# LIVE í Sjónvarpinum

Sjónvarpið hjá Kringvarpinum bjóðar um vikuskiftið ta mest umfatandi sendingina í nýggjari tíð, tá millum annað forkunnugur og vælumtóktur tónleikur verður á skránni.

Við nøvnum sum The Dreams, Eivør, Orka og Eyðun Nolsøe bjóða Kringvarpið og Norðurlandahúsið føroyingum fýra tímar av beinleiðis sjónvarpssending, har eisini føroyingar kunnu nýta høvið at stuðla Krabbameinsfelagnum.

Umframt tónleik, sang og dans, er ein filmur um krabbamein við føroyskari talu á skránni eins og kappingar og sofaprát. Undir tiltakinum vera redaktiónell innsløg, har krabbameinssjúklingar, avvarðandi, serfrøðingar á økinum og onnur taka lut.

Listafólkini, ið stuðla tiltakinum við framførslu síni, eru hesi.

Føroya Symfoniorkestur
The Dreams
Eivør
ORKA
Lena Anderssen
Martin Joensen
Barnakór úr Musikkskúlanum
Petsi Tvørfoss
Eyðun Nolsøe
Jóhannes Andreasen
Vígdis Hentze Olsen

Er bert ætlað sjónvarpsskíggjanum

Hóast tiltakið er í Norðurlandahúsinum, so ber ikki til at ogna sær atgongumerki til sjálvt tiltakið.

Vit hava valt, at bert bjóða stuðlum, hjálparfólkum, listafólkum og øðrum inn í sjálvt Norðurlandahúsið, tí hølini í Norðurlandahúsinum líkjast mest einum sjónvarpsstudio í løtuni, og tað ber illa til at bjóða tað sama í Norðurlandahúsinum, sum vit kunnu bjóða umvegis sjónvarpsskíggjan, sigur Urd Johannesen, samskipari.

Sendingin fer í luftina í morgin kl. 19.00.

# Koppseta fyri H1N1-beinkrím um mánaðarskifti

TÍÐINDASKRIV

Nú verður farið undir at koppseta fólk ókeypis, sum eru í vanda fyri at gerast álvarsliga sjúk av Influensu A (H1N1). Fólk, ið eru í vandabólki, verða tí biðin um at bíleggja tíð hjá egnum lækna.

Vandabólkarnir eru eitt nú tey, ið hava niðursett lungnavirkni, astma, hjartasjúku, sukursjúku, niðursetta immunverju og fólk við høgari yvirvekt (BMI meira enn 40). Nærri útgreining av vandabólkum sæst á heimasíðuni hjá Heilsumálaráðnum (www.hmr.fo.

Fólk, sum ivast í, um tey eru í vandabólki, eiga at seta seg í samband við kommunulæknan.

### Koppingarevnið á veg til Føroya

Koppingarevnið kemur nú til Føroya og av tí, at koppingarevnið kemur í avmarkaðum nøgdum fyrstu tíðina, hava Landslæknin og Heilsumálaráðið gjørt av, at fólk í vandabólkum undir 65 ár verða koppsett fyrst. Hetta tí royndir frá øðrum londum hava víst, at eldri ikki eru í sama vanda fyri at fáa sjúkuna ella blíva álvarsliga sjúk av H1N1.

### Soleiðis verður farið fram

Fyrst verða tey í vandabólki, sum eru undir 65 ár, koppsett. Um mánaðarskiftið november/desember verður farið undir at koppseta tey í vandabólki, sum eru 65 og eldri.

Fólk skulu sjálvi seta seg í samband við kommunulæknan og bíleggja tíð til koppsetingina. Koppað verður tvær ferðir. Koppingav av fólki í vandabólki er ókeypis.

Meira kunning um vandabólkar og koppseting fyri H1N1 fæst á heimasíðunum hjá danska Heilsustýrinum (www.sst.dk og Statens Serum Institut (www.ssi.dk.


Landsstevnan verður á Læraraskúlanum í Havn 6. og 7. november

Leygarkvøldið verður veitsla. Jens Marni við bólki spælur til dans.
Tekning til veitsluna á mail: **oluffaj@logting.fo** ella tlf. **211489**
í seinasta lagi mikudagin 4. nov. **Kostnaður 300 kr.**

Javnaðarflokkurin



demich
hiti | vatn | sanitet

*Tá vit fóru at byggja, vóru vit frá fyrstu løtu greið yvir, at vit vildu hava eina skilagóða orkuloysn*

*Jákup Haraldsen (hevur Vølund hitapumpu frá Demich)*

www.demich.fo

VILT TÚ SPARA PENING OG HUGSA UM UMHVØRVIÐ?

Demich er einasta fyritøka í Føroyum, sum arbeiðir við at útvega grøna orku úr luftini, jørðini og sjónum.







SUPER TILBOÐ
Besta luft til luft á marknaðinum
kr. 15.900 v/mvg
Íroknað uppseting



HITATÆNASTAN HJÁ DEMICH

Øll, sum keypa hitapumpu frá Demich, fáa tilboð um eina hitatænastu. Hitatænastan fevnir um eitt árligt eftirlit, har hitapumpan verður kannað. Hitatænastan tryggjar tær, at hitaskipanin virkar á bestan hátt og Demich greiðir møguligar trupulleikar.




HJÁ OKKUM FÆRT TÚ ALT INNAN HVS – M.A.

- Hitapumpur
- Ketlar
- Ventilatión
- Rør og fittings
- Baðirúmsmøblar
- Gosbað

RING OG HOYR NÆRRI



Dánjal
VÁGUR
Á Marknoyri
Tel. 22 62 65



Hjalmar
SALTANGARÁ
Heiðavegur 80
Tel. 23 23 80



Debus
TÓRSHAVN
Stiðjagøta 2
Tel. 23 93 18

Okkara dygd – tín trygd!
– vit hugsa um umhvørvið!

DEMICH P/F
Postboks 378 · Stiðjagøta 2
FO-110 Tórshavn
Tel. 309 310 · Fax 309 311
demich@demich.fo

Sosialurin | KvR 34 18 00